# NÝGGJ TRÚARJÁTTAN

**EIN TRÚARJÁTTAN...**
Vit venda bakið til alt, sum er ónt, alt, sum særir fólk og alt, sum ger fólk kedd.

Vit trúgva á ein kærligan Gud. Eitt vald, sum vil okkum væl og sum er upprunin til lívið og henda fantastiska heimin.

Vit trúgva, at einaferð livdi ein persónur, sum nevndist Jesus, og sum er ein mynd av Gudi. Hann gjørdist menniskja og livdi saman við menniskjum. Hann rúmaði teimum minstu við sínum orðum og gerðum, og vísti, at vit øll hava virði. Við sínum lívi, deyða og uppreisn vísti hann - og vísir enn í dag - á kærleikans vald og vónina í allar ævir.

Vit trúgva, at meira er ímillum himmal og jørð. At ein andi er, ein kraft, sum gevur okkum mót til at liva. At ein felagsskapur er, vit kunnu møtast í. At vit verða fyrigivin, hóast okkara býttu gerðir, og at lív er eftir deyðan.

| **Ápostólska trúarjáttanin** | **Ein trúarjáttan...** |
|---|---|
| Vit avnokta djevulin og allar gerningar hans og allan atburð hans. | Vit venda bakið til alt, sum er ónt, alt, sum særir fólk og alt, sum ger fólk kedd. |
| Vit trúgva á Gud faðir, hin alvalda, skapara himins og jarðar. | Vit trúgva á ein kærligan Gud. Eitt vald, sum vil okkum væl og sum er upprunin til lívið og henda fantastiska heimin. |
| Og á Jesus Krist, Guds einborna son, váran harra, sum er gitin av heilagum anda, borin í heim av Mariu moy, pínslaður undir Pontiusi Pilatusi, krossfestur, deyður og jarðaður, niðurfarin til heljar, triðja dagin staðin upp frá deyðum, farin til himmals, sitandi við høgru hond Guds faðirs hins alvalda, haðani hann kemur at døma livandi og deyð. | Vit trúgva, at einaferð livdi ein persónur, sum nevndist Jesus, og sum er ein mynd av Gudi. Hann gjørdist menniskja og livdi saman við menniskjum. Hann rúmaði teimum minstu við sínum orðum og gerðum, og vísti, at vit øll hava virði. Við sínum lívi, deyða og uppreisn vísti hann - og vísir enn í dag - á kærleikans vald og vónina í allar ævir. |
| Og á heilagan anda, eina heilaga almenna kirkju, samfelag teirra heilagu, fyrigeving syndanna, uppreisn likamsins og lív um aldur og ævir. | Vit trúgva, at meira er ímillum himmal og jørð. At ein andi er, ein kraft, sum gevur okkum mót til at liva. At ein felagsskapur er, vit kunnu møtast í. At vit verða fyrigivin, hóast okkara býttu gerðir, og at lív er eftir deyðan. |